Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 193 - 5. oktober 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hørð orð og hvassar atfinningar ávirka ikki Robert Mugabe, kanska heldur tvørturímóti*

*(tanzaniski forsetin)*

## Generalarnir vilja tosa við Aung San Suu Kyi

**Hernaðarstýrið í Burma er nú til reiðar at tosa við andstøðuleiðaran, men undir treytum, sum hon neyvan fer at góðtaka**

Tað er tann ovasti av generalunum, Than Shwe, sum er til reiðar at hitta Aung San Suu Kyi, men sambært teimum almennu fjølmiðlunum kemur generalurin ikki treytaleyst á fundin. Treytin er, at Aung San Suu Kyi skal sleppa sínum hugsanum um at stuðla ágangi, oyðingum og búskaparligum tiltøkum. Er hon sinnað at ganga undir hesa treyt, er Than Shwe til reiðar at tosa við hana.

Eygleiðarar siga, at tilboðið er soleiðis háttað, at Aung San Suu Kyi kann ikki taka av, men hinvegis siga teir tilboðið vera merkisvert, tí Than Shwe hevur altíð borið orð fyri at vera tann av generalunum, sum er tann harðasti mótstøðumaðurin hjá andstøðuleiðaranum.

Aung San Suu Kyi hevur sitið í húsavarðhaldi í tólv av teimum seinastu átjan árunum.




*ST-sendimaðurin Ibrahim Gambiari fekk høvi at tosa við Aung San Suu Kyi í síðstu viku*

## Fordøming ávirkar ikki Mugabe

**Tað skal anna enn fordøming og hvøss orð til at fáa zimbabwiska forsetan frá**

- Tað nyttar einki at finnast at Robert Mugabe og at fordøma hann, tí slíkum lurtar hann ikki eftir, sigur forsetin í Tanzania, Jakaya Kikwete.

Hann heldur, at tær nógvu altjóða fordømingarnar hava gjørt ilt verri, tí tær hava gjørt Mugabe treiskan, og tí virka tær beint ímóti ætlanini, heldur hann. Sjálvur ivast Jakaya Kikwete ikki í, at hinir afrikonsku leiðararnir vilja fegnir hava broytingar í Zimbabwe, men tað tekur tíð, sigur hann.

- Vit halda, at tað er rættari at samstarva fyri at finna eina loysn, tí vit koma ongan veg við at fordøma Mugabe. Tí so lurtar hann als ikki eftir, sigur tanzaniski forsetin við bretska blaðið Financial Times í dag.



*Robert Mugabe letur seg ikki ávirka av fordømingum, heldur tvørturímóti*

## Trolari smuglaði krabba



Tollarar í Kirkenes í Norðurnoregi løgdu í vikuni hald á góð 15 tons av kongakrabba, sum lógu fjald í lastini á einum russiskum trolara. Við verandi prísi høvdu russararnir fingið umleið 3,2 mió. norskar krónur fyri krabbarnar. Sambært blaðnum Nordlys er hetta fyrstu ferð, at norska tollvaldið hevur tikið eitt russiskt skip fyri at royna at smugla kongakrabba. Tað er greitt, at russiski trolarin hevði fiskað kongakrabbarnar í norskum sjógvi, og tað er eisini óvanligt, skrivar blaðið.

### STUTT SAGT

### Bush í botni

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur sjáldan verið so illa umtóktur í USA sum júst nú. Sambært einari nýggjari meiningakanning eru tað bara 31 prosent av amerikonsku veljarunum, sum eru nøgd við forsetan og avrik hansara. Teir flestu republikanararnir eru kortini nøgdir. 69 prosent av teimum siga seg vera nøgdar við forsetan, men sambært tíðindastovuni AP kann Bish heldur ikki vera nøgdur við ta undirtøkuna.

### Pinochet-skyldfólk tikin

Fleiri skyldfólk hjá fyrrverandi kilska einaræðisharranum Augusto Pinochet eru tikin, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at tey fluttu 27 mió. dollarar av landinum, meðan Pinochet sat við valdið. Sagt verður, at ein kanning hevur longu avdúkað, at átta mió. dollarar vórðu fluttar á fleiri hundrað kontur í amerikonskum bankum. Myndugleikarnir siga, at minst seytjan fólk skulu handtakast í sambandi við tann ólógliga pengaflutningin.

### Bardagar í Kongo

Herurin í Demokratiska Lýðveldinum Kongo sigur, at hann hevur beint fyri minst 35 uppreistrarmonnum í bardøgum har eysturi í landinum. Teir harðastu bardagarnir hava verið í norðara parti av Kivu-landspartinum millum stjórnarhermenn og hermenn, sum styðja tutsi-generalin Laurent Nkunda. Fyri einum mánað síðani vóru ógvuliga harðir bardagar í hesum sama økinum, og tá flýddu 90.000 fólk frá húsi og heimi. Hildið verður, at umleið 300.000 fólk fjala seg í grannalondunum.